gult6 cyan6 magenta6 svart6



## POLITIKKUR & SAMFELAG



*Formaðurin fyri stóra føroyska verkaflokkin, Jóannes Eidesgaard, helt eina ógvuliga harða politiska røðu á Vaglinum í Havn altjóða arbeiðaradagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Formaður Javnaðarfloksins verkadagin:

# Borgarliga atsóknin er ótroyttilig

**Liberalistiska bylgjan skolar inn yvir Føroyar og rákin av kapitalistiska hungurinum svíður okkum í nasarnar. Hetta heldur formaður Javnaðarfloksins, sum helst eina hvassa politiska røðu á Vaglinum altjóða arbeiðaradagin**

1. MAI
*John Johannessen*

Vit síggja eina borgarliga atsókn í dagsins Føroyum.

Hetta heldur Jóannes Eidesgaard, formaður fyri Javnaðarflokkin. Jóannes var ein teirra, ið fekk heiðurin at halda røðu í oysandi regni á Vaglinum í høvuðsstaðnum altjóða arbeiðaradagin.

Røða Jóannesar var ógvuliga vinstrahallin, sum væntað var hendan merkisdag fyri vinstrasinnað um allan heim. Formaðurin fyri stóra føroyska verkaflokkinum gjørdi nógv burtur úr at vísa á vandarnar við liberalistisku bylgjuni, sum eftir hansara tykki skolar inn yvir Føroyar.

– Rákin av kapitalistiska hungurinum eftir øllum tí, sum kann gera tann ríka ríkari, svíður okkum í nasarnar. Caragata-álitið er meira siterað enn sjálv Hvítabók. Og við hvørt høvið, sum býðst, verður privatiseringin og egoisman hálovað. Vit síggja eina ótroyttiliga borgarliga atsókn, segði Jóannes Eidesgaard.

### Pensjón fyri rík

Sum eitt dømi um borgarliga atsókn nevndi Jóannes Eidesgaard nýggju pensjónsskipanina, sum ætlanin er at seta í verk.

– Fáa teir sín vilja, so fer hendan pensjónsskipanin at gera, at tey, sum hava ein høga fasta inntøku gjøgnum alt sítt lív og hava heilsuna, gerast væl fyri á gamalsaldri, meðan restin verður meira ella minni slept upp á fjall, staðfesti hann.

Í hesum sambandi setti Jóannes Eidesgaard eisini fram spurningin, um tað er rætt, at tað almenna gjøgnumtvingar eina privata skipan, ið ger, at tey, ið lítið hava eftir at húsast fyri í arbeiðslívinum, eisini koma at hava lítið at húsast fyri á gamalsaldri.

– Hvussu við teimum, ið ikki hava eina inntøku ein stóran part av lívinum, til dømis av heilsuávum? Tey gerast olmussudýr í nýggju pensjónsskipanini, gjørdi formaður Javnaðarfloksins greitt.

Loysnina til eina góða pensjónsskipan helt Jóannes Eidesgaard vera eina hækkaða kollektiva og samhaldsfasta pensjón.

– Kalla okkum gamaldags, men vit á vinstraveinginum í politikki halda, at sømulig kor á gamalsaldri er ein rættur hjá øllum borgarum, uttan mun til, um inntøkan hevur verið høg ella lág, staðfesti Jóannes Eidesgaard.

Hann vísir eisini í sama sambandi á, at borgarligu flokkarnir ofta pástanda, at teir standa fyri einum sosialum trygdarneti, eins og vinstraflokkarnar. Hetta helt hann væl kundi vera, men at munur er á meskavídd.

– Tað verða nógv, sum detta ígjøgnunm tað sosiala trygdarnetið, sum verður lagt upp til av liberalistunum, ið sita við róðrið í dag.

*»Nú meira enn tíggju ár eftir, at føroyski bankaheimurin nærum fór fyri bakka undir privatari leiðslu, so pástanda tær kreftir, ið nú vilja sleppa fram at aftur fatinum, at eitt nú Føroya Banki hevði verið betri rikin við einum privatum eigaraskara.«*

### Barnsburðargrunnurin er glotti

Sitandi samgonga fekk kortini ikki bara rís frá formanninum í Javnaðarflokkinum. Hann fegnaðist eisini um barnsburðargrunnin, og at karensdagarnar eru burtur.

*»Tað er við Føroya Banka væl og virðiliga prógvað, at ein fyritøka kann vera væl rikin, um landið eigur hana.«*



*Finnir Helmsdal úr hinum føroyska flokkinum á vinstraveinginum, helt eisini røðu á Vaglinum 1. mai. Her prátar hann við »the grand old man« í Havnar Arbeiðsmannafelag, Karl Johansen*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

gult7 cyan7 magenta7 svart7



## POLITIKKUR & SAMFELAG



*Oysandi regnið gjørdi, at altjóða arbeiðaradagurin svann burtur í føroyska høvuðsstaðnum. Mannfjøldin á Vaglinum var so lítl, at tú hevði hug at hugsað, at meginparturin av føroyingum eru borgarligir. Men nei, onkur veruligur verkamaður var at síggja*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

*»Liberalistiska bylgjan skolar inn yvir okkara samfelag. Rákin av kapitalistiska hungurinum eftir øllum tí, sum kann gera tann ríka ríkari, svíður okkum í nasarnar.«*

– Fyri fáum døgum síðani hendi eitt risa framstig. Ein barnsburðargrunnur fyri allan arbeiðsmarknaðin sá dagsins ljós og sjúkradagpeningur frá fyrsta sjúkradegi gjørdist veruleiki fyri tey tímaløntu. Ein stórur sigur fyri verkafjøldina og ein stolt løta fyri hetta høga ting, sum her tók málið um karensdagarnar í egnar hendur í uttan iva virðiligastu samtyktini í hesum valskeiði, fegnaðist Jóannes Eidesgaard.

Men kortini helt hann, at lopið enn er langt frá teimum tímaløntu til tey fastløntu. Hann vísti á, at fastlønt og tímalønt hava lagt frá somu sømdir, tá tað snýr seg um at vera heima hjá sjúkum børnum.

– Her skal tann tímalønti við læknaváttan prógva, at talan er um hættisliga sjúku, meðan tann fastlønti ger tað við einari fráboðan. Og hjá tí tímalønta fær annað foreldrið bert 80 prosent av einari dagløn fyri hesa fráveru. Her skal nakað gerast, staðfesti Jóannes Eidesgaard.

Eisini innan KT-vinnuna helt Jóannes Eidesgaard, at hugburðurin má broytast. Hann vísti á, at í staðin fyri at halda eina heila stætt uttan fyri hesa vinnu, kundu vit verið undangonguland við at latið alt fólkið verið partur av vinnuni.

### Privata initiativið spældi fallit

Formaðurin í Javnaðarflokkinum fanst harðliga í røðu sínari at tosinum um at privatisera almennar ognir, harímillum Føroya Banka. Hann vísti á, at skattgjaldarin í dag eigur Føroya Banka, Fiskasøluna, Fiskavirking, JFK-Trol, Føroya Tele, Atlantsflog og aðrar føroyskar stórfyritøkur.

Og hví eiga vit hesar fyritøkur, spurdi hann.

– Ikki tí, at vit hava valt tað so, men heldur tí, at privata initiativið so dyggiliga spældi fallit, staðfesti hann síðani.

Í hesum sambandi vísti Jóannes Eidesgaard á, at tað í sekstiárunum var Føroya-grunnurin, sum tók eftir einum av størstu fallitbúgvunum í Føroya søgu. Og í nítiárunum var tað landskassin, sum tók um endan á Føroya Banka og Sjóvinnubankanum.

– Nú minni enn tíggju ár eftir, at føroyski bankaheimurin nærum fór fyri bakka undir privatari leiðslu, so pástanda tær kreftir, ið nú vilja sleppa framat aftur fatinum, at eitt nú Føroya Banki hevði verið betri rikin við einum privatum eigaraskara.

– Álvaratos, bankin hevur eitt tað besta úrslitið í danska ríkinum og gevur metyvirskot til skattgjaldaran ár eftir ár. Hvussu nógv betri kann úrslitið hjá bankanum gerast?

Skal skattgjaldarin nú avhenda hetta fyri lítið og lætt eftir at hava tikið tøkini og ruddað upp eftir rentuspekulatión og annað, spurdi Jóannes Eidesgaard og staðfesti, at Føroya Banki er eitt prógv um, at ein fyritøka kann verða væl rikin, um landið eigur hana.

Jóannes Eidesgaard nam annars eitt sindur við fullveldismálið. Hann segi millum annað, at onnur týdningarmikil mál eru skúgvað til viks fyri tíð. Hann tók eisini eitt sindur í arbeiðarasøguna og politiskar hendingar í Føroyum av týdningi fyri arbeiðaran.

*»Fastlønt og tímalønt hava langt frá somu sømdir, tá tað snýr seg um at vera heima hjá sjúkum børnum. Her skal tann tímalønti prógva, at talan er um hættisliga sjúku, meðan tann fastlønti ger tað við eini fráboðan. Og hjá tí tímalønta fær annað foreldrið bert 80 prosent av einari dagløn fyri hesa fráveru.«*

Sjálvstýrissamtyktin:

# Danir bíða við útmeldingunum

**Í dag er fundur í donsku Føroya-nevndini um sjálvstýrissamtyktina. Men nógv bendir á, at verða noydd at bíða til orðaskiftið á Fólkatingi 9. mai eftir donskum svari**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*

Tað verður helst ein friðarligur fundur hjá donsku Føroya-nevndini hjá Fólkatinginum í dag um føroysku sjálvstýrissamtyktina.

Sum skilst av Christiansborg, er tað ikki hesin fundurin, men spurnarorðaskiftið um Føroyar í Fólkatinginum, sum verður áhugavert fyri sjálvstýrissamtyktina.

Danskir politikarar vænta ikki, at Poul Nyrup Rasmussen í dag fer at koma við einari útsøgn um, hvat hann heldur um sjálvstýrissamtyktina hjá løgtinginum. Uppskotið um sjálvstýri Føroya fólks varð samtykt 20. apríl í ár, og eingin viðmerking er komin frá danska stjórnarleiðarnum um tað síðani.

Men spurnarorðaskiftið um Føroyar í Fólkatinginum 9. mai skal enda við eini samtykt, har Fólkatingið sigur sína meining um ætlanina hjá landsstýrinum og framtíðarviðurskiftini millum Føroyar og Danmark yvirhøvur.

Endamálið við orðaskiftinum er nevniliga at gera støðuna hjá Fólkatinginum og stjórnini greiða, so landsstýrið kennir støðuna. Tí verður tað hesin fundurin, ið verður grundarlagið undir víðari samskiftinum millum Føroyar og Danmark, hvat sjálvstýri viðvíkur.

Vantandi verður tað ein breiður meiriluti, ið 9. mai samtykkir linjuna hjá donsku stjórnini mótvegis Føroyum í framtíðini.



*Tað verður helst einki stórvegis at frætta úr Danmark um føroysku sjálvstýrissamtyktina, fyrr enn eftir spurnarorðaskiftið í Fólkatinginum 9. mai*